# Prestafelagið mótmælir at morgunlestrarnir verða skerdir

PRESTAFELAG FØROYA:
JÁKUP REINERT HANSEN,
*formaður,*
THEODOR E. D. OLSEN,
*næstformaður*

Skotbráið varð stutt, ið Føroya fólk fekk, tá kringvarpsleiðslan boðaði frá, at nú skuldu morgunlestrarnir ikki longur sendast kl. 9.50.

Fráboðanin kom fríggjadag, og mánadag kom hetta í gildi.

Argumentið var, at hetta riggaði ikki inn í restina av skránni. Hesir 10 minuttirnir kundu gera, at tað almenna kringvarpið misti lurtarar, varð sagt.

Latum okkum hyggja nærri at hesum argumenti.

At Morgunlesturin ikki riggar inn í skránna, er ilt at síggja. Sum so tykist ikki vera nøkur serlig yvirgongd millum morgunsendingina, tíðindini og sendingina Ctrl e. Og sum oftast plagar morgunsendingin at enda við tónleiki, har Morgunlesturin plagdi at vera.

Vit hava ikki sæð hagtølini, ið Kringvarpið grundgevur við. Men í lurtarakanning, sum varð gjørd í mars/apríl 1996 (tann seinasta, vit hava sæð), vórðu 200 fólk spurd hvørt kvøldið millum 27/3 og 15/4, tilsamans 1328 svaraðu. 43% lurtaðu eftir morgunlestri kl. 07.05 og 38% kl. 09.05. Tá var sjálvandi eingin onnur rás; men kortini eru hesi tøl so høg, at tey mugu takast í álvara.

**Ikki spurt tey, ið skriva**
Tað undrar okkum í Prestafelagnum, at vit ikki vórðu kunnað um hesa avgerð, áðrenn hon varð tikin. Tað eru hóast alt vit, ið skriva morgunlestrarnar.

Morgunlestrar eru sjálvandi ymiskir. Men felags fyri hesa mentanarsending er, at hon er skrivað av prestum, tvs. guðfrøðingum. Hetta hevur eisini verið aðaltátturin, síðani tann fyrsti útvarpsstjórin, Axel Tórgarð, sum eisini var prestur, byrjaði hesa siðvenju. Fakliga skuldi støðið vera høgt, men atkomiligt fyri øll. Leggjast kann eisini aftrat, at fleiri av morgunlestrunum hjá Axeli Tórgarð eru givnir út í bók og verða lisnir enn.

Tað undrar okkum eisini, at henda sending eftir øllum at døma verður so lítið vird av kringvarpsleiðsluni, at hon ikki skal tola at verða send umaftur kl. 9.50, tí hon er sera bílig at framleiða, hóast vælútbúgvið fólk og akademikarar standa fyri henni. Og tað mátti komið væl við hjá kringvarpinum í hesum tíðum.

**Bíligt og breitt**
Heldur ikki ber til at siga, at Morgunlestrarnir bert eru fyri tey tilkomnu og gomlu. Tað eru eisini yngri aldursbólkar, ið lurta, og tað kemur meira enn so fyri, at fólk skifta orð sínámillum um Morgunlestrarnar, sum hava verið sendir í vikuni. Hetta vita vit, sum skriva, frá tí responsi, vit ofta fáa.

Morgunlestrarnir eru ætlaðir til umhugsni, reflektión og eina stilla løtu – og hesum er ikki so nógv av í tí annars fjølbroyttu útvarpsskránni.

Prestafelagið, sum umboðar prestarnar í Føroyum, sum skriva Morgunlestrarnar, vil tí heita á Kringvarp Føroya um aftur at endursenda Morgunlestrarnar kl. 9.50 í útvarpinum. Sjónvarp er ikki á øllum arbeiðsplássum, øllum rúmum í húsinum og enn minni í øllum bilum, og tí kunnu vit heldur ikki taka undir við ætlanini hjá Kringvarpinum, at endursenda Morgunlestrar gjøgnum sjónvarpstólið.

Við tøkk fyri annars gott samstarv við Kringvarpið.

# Ein óneyðug provokatión

DÁVUR WINTHER



Tá ið fólkið, biskupur, dómpróstur, prestafelagið, kristiligt lurtarafelag, hópin av felagsskapum og einstaklingum frá øllum handans samkomum og ikki minst tingið, tekur sær tíð til at viðgera eitt slíkt hjarnumál fyri eina tjóð, sum kallar seg kristna - og øll tey gomlu í landinum saman við sjómonnum eisini hava mótmælt, at morgunlesturin ikki verður endursendur; so átti ein sendistøð, ið kallar seg public service-veitari at havt fyrilit fyri hvat "public" -fólkið- ynskir og vil hava!!!

Hetta málið snýr seg um respekt ella virðing - og kanska eisni um mangul uppá sama.

Tað tykir mær sum Kringvarpið sendir eina undarliga, óheppna, fyrilitarleysa og ikki minst óneyðuga provokatión á henda hátt!

- Hvat endamálið er, og hvør endi á hesum máli verður - ja, kunnu bert guðarnir vita.

# Kringvarpið = Hermirásin

TERJE HANSEN

Áðrenn Rás2 byrjaði - var alt í ÚF stórt sæð sum tað hevði verið í 40 ár.

Men so kom privata Rás2 - við studio í Klaksvík (Norðlýsið).

Stutt eftir helt ÚF, at tað var upp á tíðina at byrja at hava sendingar úr studio í Klaksvík.

Eftir nøkur ár gevst Rás2 við hesum, hvat gjørdi ÚF eftir tað - tað sama.

Rás2 byrjaði frá byrjan at senda Orðið (bíbliulestur ) kl.9:45. Hvat ger ÚF? Jú teir mugu flyta morgunlesturin, sum í mannaminni hevur verið endursent kl 9 fyrrapart, til somu tíð - (genialt).

Hví mátti ÚF (hermirásin) brádliga flyta tíðindasendingina sum í 50 ár var send kl 18:30 til kl 18?? Var tað uppá grund av lúðurinum á skipasmiðuni (sambart Jógvan Jespersen) ella var tað tí at tíðindini á Rás2 vóru kl 18.

Rás2 tekur Orðið av skránni - og hvat ger Hermirásin nú? Jú morgunlesturin má avtakast, ti at tá Rás2 ikki sendir bíbliulestur kl 9:45 - ja hví so ÚF - (genialt).

Ynskiløtan hevur altíð verið seinnapart á Rás2 - hvat ger Hermirásin nú - (genialt).

Nú hevur IKTUS sent andaligt tilfar á sjónvarpi í nakrar mánaðir - t. d. fyrrapart – og hvat ætlar Kringvarpið nú? - jú nú halda tey, at tað er sera gott at senda t.d. morgunlestur fyrrapart í sjónvarpinum - og enntá sangir/sálmar við teksti á skerminum - júst tað sum Iktus ger - (genialt).

Kundi sikkurt funnið nógv onnur dømi, og hetta fer óivað at halda áfram.

Man má bara siga, at programfólkini á Kringvarpinum eru sera kreativ, tey fáa løn fyri at herma.

Hvussu hevði sæð út, um einki privat útvarp og sjónvarp var? - jú sum fyri c.a. 40 árum síðani!

Eg haldi, at tað almenna Kringvarpið hevur spælt fallit. Public Service kravi kundi verði deilt út til allar luftmiðlarnar, t.v.s. eisini milliónirnar. Hví skullu allar milliónirnar fara til tann eina, sum næstan bara hermir eftir teimum privatu miðlunum?

Lesið Sosialin - so eru tit við

# Tøkk



Ein hjartans tøkk til tykkum mongu,
sum gleddust saman við mær
og gjørdu mín 85-ára føðingardag
ógloymandi.
Túsund takk fyri gávur, blómur, sangir,
talur, køkur, fjarrit og heilsanir.
Somuleiðis stóra tøkk til tykkum øll,
ið á ymiskan hátt hjálptu til,
so føðingardagsveitslan gjørdist so góð og
hugnalig.

Tøkk øll somul

*Blíðar heilsanir*
**Gretha Husgaard**

# Takk

Øllum tykkum úr bygd og úr bý, ið vóru við til at gera sjeyti ára føðingardag mín ógloymandi og hátíðarligan, sendi eg eina hjartans tøkk.

Takk fyri tlf. uppringingar, fjarrit, gávur og blómur. Stóra tøkk til tykkum, sum hjálptu til.
Ein serliga tøkk til Marner og Henning, ið settu sín serliga dám á veitsluna.

Eg ynski tykkum øllum eitt av Harranum signað nýttár.

**Vinarliga heilsan**
**Fríðolv Eysturberg, Hvalba**

## Prógv

31. januar 2008 vera Joan Djurhuus av Morkranesi og Rúni Djurhuus úr Havn útlærd sum kramba-kallar.

Tey hava bæði staðið í læru hjá PE, Joan á Argjum og Rúni á Heykavegnum í Havn.

**Dagurin**
**3. februar, Blásius**, deyður umleið ár 300. Tikin av døgum fyri trúar sakir. Var biskupur í Sebaste í núverandi Turkalandi, og av tí at hann bjargaði einum smádrongi, sum hevði sett eitt fiskabein í hálsin, varð hann tilbiðin sum verndari fyri hálsverk.